

# Mat- og gagnplantur í Nólsoy

**PLANTUR** Kunningarstovan í Nólsoy skipar í summar fyri fleiri tematúrum fyri nólsoyingum og øðrum – bæði føroyskum og útlendskum gestum

Leo Poulsen

Í morgin verður skipað fyri einum hugnaligum kvøldartúri, har Disa Christiansen fer at vísa runt í bygdini og í nánd av bygdini. Greitt verður frá um villar plantur og húsplantur, og hvørjar gagnligar eginleikar tær hava. Heilt nógvar av okkara plantum eru vælsmakkandi, eru vælegnaðar til matnað og hava harumframt grøðandi eginleikar.

Kl. 18.00 Farið verður við Ternuni av Bursatanga

Kl. 18.30 Túrur til gongu við Disu Christiansen

Kl. 20.30 Heimavirkið er opið

Kl. 20.30 Kunningarstovan er opin og hevur kaffisølu. Uppskriftir vera til taks.

Kl. 20.30 Kaffistovan er opin

Kl. 22.25 Ternan fer av Klivum

Ferðaseðilin verður keyptur umborð og kostar 45 krónur báðar vegir. Túrurin kostar 50 krónur, børn tó ókeypis. Goldið verður, tá túrurin byrjar.

*leo@sosialurin.fo*

# Her er avloysarin hjá Smyrli

**AVLOYSARASKIP** Strandferðslan hevur nú funnið skipið, sum skal avloysa Smyril ímeðan hann fer í dokk í september

Áki Bertholdsen

Nú er greitt, hvat fyri skip, skal avloysa strandfaraskipið, Smyril, tá ið hann fer í dokk í september.

Samráðingarnar um eitt leigumál eru komnar heilt væl áleiðis og kemur ikki okkurt helt óvanligt í vegin, verður ein sáttmáli undirskrivaður heilt skjótt, sigur Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni.

Strandferðslan hevur mangan fingið harðar ábreiðslur fyri tey skipini, sum hon hevur funnið at avloysa á suðuroyarleiðini, tá ið Smyril hevur verið í dokk, tí hvørki politikarar ella ferðafólk hava mett, at skip sum St. Ola ella Claymore, hava verið nøktandi alternativ til Smyril.




*Tað verður hetta skipið, sum skal avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk í heyst. Kemur onki heilt óvanligt í vegin, verður leigusáttmáli undirskrivaður heilt skjótt*

Men hesuferð verður neyvan nakað at fýlast á, tí skipið, sum Strandferðslan hevur funnið, er bæði stórt og gott.

Talan er um ferjuna, Regina Baltica, sum eitt felag í Riga eigur og sum er bygd í Finnlandi í 1980.

Ferjan er nakað størri enn Smyril, ella 145 metrar long og hon tekur 1500 fólk og næstan 500 bilar, tað er tvær ferðir so nógv, sum Smyril.

Tá ið hon kemur til Føroyar, verða partar av henni, náttklubbar og annað, stongt

Ferjan siglur góð 21 míl, men av tí, at hon er so stór og høg, er væntandi, at hon verður verri at manøvrera og tí sigur rakstrarleiðarin hjá Strandferðsluni, at tey vænta, at hvør ferð ímillum Suðuroy og Havnina fer at taka 10-15 minuttir longri enn við Smyrli.

Regina Baltica fer at avloysa Smyril í einar fýra vikur, ella gott tað.

Conrad Gaard Joensen hevur verið og hugt eftir skipinum og hann sigur, at hann er væl nøgdur við tað, tí skipið er vælhildið og nossligt.


